VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 12 og 15 stig. Hósnáttina møguliga regn.



Veðrið hósdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 14 og 17 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og sólglottar, men eisini mjørki í støðum. Seinnapartin regn eitt skifti. Hitin millum 14 og 17 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum, turt og sólglottar, men sunnudagin veksur hann vindin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur. Hitin leygardagin um 15 stig, sunnudagin nakað kaldari.

Vegur við súkklubreyt

Nýggi Glyursvegurin á Argjalandinum skal vera ein nýskapan innan føroyska vegagerð, har tann bleyta ferðslan og umhvørvið verða sett í hásætið

Soleiðis sær ætlaða vegaføringin av Glyvursvegnum út, sum tekniska nevndin í býráðnum samtykti í síðstu viku, og sum væntandi verður samtyktur endaligt á býráðsfundi 13. september

ÚTBYGGING

Kári Mikkelsen
karim@Sosialurin.fo

Vegaføringin av nýggja Glyvursvegnum er nú løgd, og hon varð samtykt av teknisku nevnd í býráðnum týskvøldið í síðstu viku.

Sambært forkvinnuni, Marin Katrinu Frýdal, er talan um nýskapan innan føroyska vegagerð, tí her eru tey bleytu ferðandi sett í hásætið, og samstundis er hugsað um umhvørvið, og tey sum búgva upp at vegnum.

- Vegurin, ið er ein 50 km/t vegur, hevur gongu- og súkkluteig uppá tríggjar metrar breidd á báðum síðum. Gongutunnil er undir vegin, soleiðis at tey, ið vilja ferðast yvirum vegin, sleppa frá at fara út ímillum bilarnar, sigur Marin Katrina Frýdal.

Víðari sigur hon, at vegvatnið verður reinskað, áðrenn tað fer út aftur í áir og løkir. Fram við vegnum verður plantað runnar og trø, bæði sum umhvørvisvernd móti árini frá ferðsluni og fyri at fríðka.

- Vøksturin vil taka dust av vegnum, verja tey nærmastu ímóti óljóði, fremja CO2 binding, og fjala tað stóra benið í berginum í ovara borði, sigur forkvinnan í teknisku nevnd.

Av samlaða kostnaðinum fyri vegastrekkið, ið fer upp um 20 milliónir krónur, eru gott trý prosent sett av til planting og fríðkan av lendinum.

- Her er avgjørt talan um eina nýskapan innan vegagerð her á landi. Í hesum sambandi kann eg nevna, at í skandinavisku grannalondunum er vanlig áseting – og vistnokk krav í summum førum at seta av eina ávísa prosentupphædd av samlaða byggikostnaðinum til hesi endamál. Eini fimm prosent skulu brúkast til tann grøna partin av eini verkætlan, soleiðis at umhvørvið og tey grønu og bleytu virðini verða tilgóðasæð á fullgóðan hátt. Tað er tí at vóna, at hetta við tíðini eisini verður ein siðvenja her hjá okkum, sigur Marin Katrina Frýdal.

Ætlaða vegaføringin av Glyvursvegnum verður væntandi samtykt á býráðsfundi 13. september, upplýsir forkvinnan í teknisku nevnd, Marin Katrina Frýdal.

Marin Katrina Frýdal, sum umboðar Tjóðveldisflokkin í Tórshavnar býráð, er forkvinna í teknisku nevndini

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	3
Nuuk	7
Qaqortoq	10
Ammassalik	6
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	11
Seyðisfjørður	7
Tórshavn	10
Lerwick	10
Aberdeen	15
London	19
Tromsø	--
Bergen	11
Oslo	--
Stokkhólm	18
Keypmannah.	18
Helsinki	13
Moskva	17
Berlin	19
Warzawa	18
Kiev	20
Bukarest	17
Paris	20
Madrid	29
Róm	27
Malorca	26
Athen	29
Malta	28
Tunis	29
Beijing	27
New Dehli	34
Bangkok	31
Jakarta	32
Sydney	18
New York	25
Miami	30
Los Angeles	28
Meksikobýur	23
Panama	30
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	18

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt djúpt lágtrýst, 974 hPa. vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið vestan fyri Føroyar fer eystureftir.



Í dag:
Lágtrýstið í landnyrðing úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið sunnan fyri Føroyar nærkast Føroyum mikukvøldið

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 2/9 kl. 06^{00} – 3/9. 06^{00}. Hitin í gjár: 8,1°
Minsti hiti máldur í september: -0,5° - Mesti hiti máldur í september: 19,5°

AVFALLIÐ



Avfallið: 5,0 mm – mált frá 2/9 kl. 06^{00}– 2/9 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í september: 5,0 mm

VESTFALLSKYRRINDI

4. september Mánin næstur jørðini
5. september Seinna kvarter
13. september Tendring
19. september Mánin
longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
3. sept.	11.59	-	10.59	-	11.14	-	01.31	13.59	02.31	14.59	10.14	23.18	09.14	22.18	-	12.14	00.46	13.14	11.44	-	00.31	12.59
4. sept.	01.03	13.24	00.03	12.24	00.18	12.39	03.03	15.24	04.03	16.24	11.39	-	10.39	23.43	01.18	13.39	02.18	14.39	00.48	13.09	02.03	14.24
5. sept.	02.28	14.50	01.28	13.50	01.43	14.05	04.28	16.50	05.28	17.50	00.43	13.05	-	12.05	02.43	15.05	03.43	16.05	02.13	14.35	03.28	15.50
6. sept.	03.18	15.47	02.18	14.47	02.33	15.02	05.18	17.47	06.18	18.47	01.33	14.02	00.33	13.02	03.33	16.02	04.33	17.02	03.03	15.32	04.18	16.47
7. sept.	04.14	16.41	03.14	15.41	03.29	15.56	06.14	18.41	07.14	19.41	02.29	14.56	01.29	13.56	04.29	16.56	05.29	17.56	03.59	16.26	05.14	17.41

Tiltøk í Miðlahúsinum í september

15. september kl. 16.00
Tutl aðalfund

21. september
Alzheimersfelagið

Lesið Sosialin -tað loysir seg